# Føroysk samkynd í nýggjari bók

**Fyri fyrstu ferð verður støðan hjá samkyndum viðgjørd í føroyskari bók**

FRÆNDAFUNDUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Millum mongu fyrilestrarnir á sætta Frændafundinum í summar vóru tveir um samkynd. Nú fyrilestrar verða útgivnir í bók, er hetta samstundis fyrstu ferð, at støðan hjá samkyndum í Føroyum verður viðgjørd í eini føroyskari útgávu.

### Skelkandi dømi

Tvær greinar um samkynd eru við í bókini, ein á føroyskum og ein á íslendskum.

Í greinini "Samkynd mett søguliga, samtíðarliga og ynski fyri framtíðina" greiðir føroyski Bogi D. Davidsen, dr.med og yvirlækni, frá støðuni hjá samkyndum í Føroyum, Norðurlondum og alment, søguliga og í dag; um hvussu hon er merkt av gomlum fordómum og vantandi upplýsing og hvussu tað hevur lemjandi ávirkan á lívið hjá nógvum einstaklingum og teirra avvarðandi.

Bogi D. Davidsen tekur skelkandi dømi frá seinna heimsbardaga, tá ið samkyndir menn við ljósareyðum tríkanti sum frámerki vórðu píndir, og týndir umfarmt at hann tekur talandi dømi úr okkara tíð í Føroyum og aðrastaðni. Men hann vísir eisini á framstig, ið eru hend, og hvat eftir er at gera. Hent heimildaskrá fylgir greinini.

### Samkynd og bíblian

Umboðandi íslendska partin skrivar K. Hulda Guðmundsdóttir, MA í gudfrøði, um samkynd og mentan. Hon tekur støði í Bibliuni og minnir á, at tá ið vit lesa fornan tekst, mugu vit altíð tulka við størsta varsemi. Hon heldur, at vit eiga altíð at lesa bíbliutekst í størstan mun út frá teimum áskoðanum og virðum, ið ráddu í samfelagnum, sum framleiddi tekstin. Viðvíkjandi samkynd og Skriftini heldur hon tað tí vera neyðugt at kanna røturnar hjá kristnari mentan í staðin fyri bara at hyggja at orðunum í Skriftini sum tey standa í týðingunum, vit eru meinkunnug við frá barnsbeini.

Í sambandi við greinarnar um samkynd kann eisini nevnast, at í málfrøðiliga partunum av bókini viðger Þóra Björk Hjartardóttir MA íslendsk heiti á samkyndum, og hvussu ymisk sjónarmið hava verið á tí økinum.

# Sætti Frændafundur komin út í bók

**Sum úrslit av at sætti Frændafundur varð hildin seinasta summar, kemur nú út bók við fyrilestrunum, ið hildnir vórðu á ráðstevnuni**

FRÆNDAFUNDUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ráðstevnan varð hildin sum partur av granskingarsamstarvi millum Fróðskaparsetrið og Hugvísindadeild Háskóla Íslands.

Frændafundur er tvímálsligur: Fyrilestrarnir vóru hildnir á íslendskum ella føroyskum, og sama býti er galdandi fyri prentaðu útgávuna, sum eisini hevur stuttar enskar samandráttir.

Ráðstevnan er tvørfaklig, og á sætta fundinum vóru evnini: mál, støðan hjá samkyndum, støðan hjá útlendingum, barnabókmentir, kommunu¬samanlegging, myndlist tey seinastu tíggju árini, tónleikur og binding og sniðgáva.

### Handarbeiði og snið

Milllum forkunnugu evnini hesuferð eru íkostini hjá føroyskum serfrøðingum um ullarvirking, samfelagsliga, búskaparliga og listfrøðiliga. Fyrilestrarnir eru hesir: Osva Olsen fil. mag,: "Binding og kvinnuleiklutir í 20. aldar Føroyum"; Áslaug Sverrisson MA: "Af áhrifum fjölþjóðlegra hugmyndastrauma á íslenskt handverk á tímabilinu 1880-1920"; Nicolina Jensen Beder, handarbeiðslærarinna: "Uppruni og líkleikar – handfaring av ull í Føroyum og Íslandi"; Ása Hátún ullarsniðgevi: "Nýggjar leiðir í føroyskari ullartilvirking"; Katrina í Geil sniðgevi: "Sniðgeving innan handbinding fyrr, nú og frameftir"; Annika Skaalum, BA: "Bindikklubbaslóðir."

### Paraðir fyrilestrar

Í ein mun eru fyrilestrarnir í bókini paraðir, soleiðis at sama evni verður sæð úr ávikavist føroyskum og íslendskum sjónarhorni. Sum dømi kunnu nevnast íslendski fyrilesturin, "Er íslensk málstefna að verða úrelt?" og samsvarandi føroyski "Málspurningar í Føroyum á reki millum tvær lógargreinir", sum báðir hava málrøkt í heimlandinum sum evni.




*24 sera ymiskar greinar eru hesuferð at finna í "Frændafundur"*

## FAKTA

**Ritstjórn og nevndir**

**Aftast í Frændafundur 6 hent yvirlit yvir allar prentaðar fyrilestrar frá Frændafundum 1 - 6. Í yvirlitinum eru fyrilestrarnir býttir í 4 bólkar eftir evnunum:** Mál, list, búskapur og vinnulív, havfrøði og fiskifrøði.

Ritstjórar á bókini hava verið Turið Sigurðardóttir, formaður í Íslandsnevndini á Fróðskaparsetri Føroya og Magnús Snædal, limur í Føroyanevndini á Hugvísindadeildini á Háskóla Íslands.

**Íslandsnevndina á Fróðskaparsetrinum manna:** Turið Sigurðardóttir, formaður, Anfinnur Johansen, Jóhan Hendrik W. Poulsen, Lena Reinert og Malan Marnersdóttir.

**Føroyanevndina við Háskóla Íslands manna:** Ingi Sigurðsson, formaður, Höskuldur Þráinsson Magnús Snædal, María Garðarsdóttir og Pétur Knútsson.

Fyrilestrar frá føroyskari-íslendskari ráðstevnu í Tórshavn 26.-28. juni 2007
Supplementum annales societatis scientiarum Færoensis, 49. bd.
Fróðskapur 2008, 304 blaðsíður.
Bókin er savn við 24 greinum helvt um helvt á føroyskum og íslendskum við enskum samandrátti til hvørja grein

# Hannis Martinsson í ótespiligari fløkju

**Onki mark er fyri gitingunum í ótespiliga málinum, sum detektivurin Hannis Martinsson verður fløktur inn í í nýggju krimibókini Metusalem, sum júst er komin út**

KRIMISØGA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Enn einaferð sleppa lesarar á kanningarferð saman við Hannis Martinsson, nú Jógvan Isaksen gevur út fimtu bókina um vælumtókta detektivin úr Havn. Og málið, Hannis hesuferð verður drigin inn í, er ikki tespiligt:

"Maðurin stakk aftur spakan niður í ta myrkabrúnu evjuna og slongdi tað, hann hevði fingið uppí eftir tí fyrra. Hesaferð kom tað tvørturum andlitið, og hann eymkaði seg. Okkurt harðari enn bleyt óhumska hevði rakt hann. Hann rætti seg niður og tók eitthvørt upp. So rópti hann og vísti tey grábleiku beinini av eini mannahond"

Kommunumenninir, sum reinsa Hoyvíkstjørn, er komnir fram á eina beinagrind, sum ein C-14 tíðarfesting vísir er um túsund ára gomul. Uppskotini og gitingarnar, um hvør tann deyði man vera, eru næstan uttan mark, men eitt vóru fólk kortini samd um, og tað var at kalla beinaræið fyri Metusalem. Men so verður Hannis Martinsson ringdur upp av einum sandingi, sum sigur, at tann deyði er beiggi hansara, ið hvarv í 1961. Frá hesum degi verður Hannis fløktur inn í eina røð av hendingum, sum hava træðrir aftur til skotskatrolaran Red Crusader og hernaðarstøðina í Mjørkadali.

Tað er Mentanargrunnur Studentafelagsins, sum gevur út nýggju krimisøguna, ið er at fáa í bókhandlum kring landið.



*Hannis Martinsson verður fløktur inn í eitt sera ótespiligt mál í nýggju bókini hjá Jógvani Isaksen*

# Vida A. Højgaard við nýggjum yrkingasavni

**Lesarin kennir seg skjótt aftur í gerandismyndunum, sum Vida A. Højgaard setir fram í sínum fyrsta yrkingasavni, ið júst er komið út**

YRKINGAR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nýggja savnið hevur heitið "Novemburmorgun", og er tað sett saman av vøkrum og kenslubornum tekstum, har høvundurin við gløggskygni tekur um grundleggjandi spurningar í tilveruni.

Í savninum setur høvundurin orð á upplivingar og kenslur, sum vit øll kenna sum menniskju, og hon setur tær í perspektiv.

Her eru myndir frá kærleiksnátt, frá føðideildini, tá ið døttirin eigur, og jólaóðnin í 1988 verður lýst at hava ein javnlíka inni í frásøgufólkinum sjálvum. Gerandismyndir og myndir, sum kanska ikki eru so gerandisligar, verða settar fram, so lesarin kennir seg aftur.

Vida Akseldóttir Højgaard gjørdi fyrstu fer vart við seg sum rithøvundur, tá hon gav út skaldsøguna Mørk í 2005.

Tað er Mentunargrunnur Studentafelagsins, sum gevur út "Novemburmorgun", ið er 42 blaðsíður.

Sørin D. Højgaard hevur gjørt permumyndina.




*"Novemburmorgun" eftir Vidu A. Højgaard*